KÍ-Skála:

# Klaksvíkingar eru betri fyri enn fyrr í ár

**Á Skála stendur ikki væl til, nú teir skulu til Klaksvíkar fyri at endurtaka avrikið í steypakappingini**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

Einasta liðið, sum framvegis ikki hevur vunnið í landskappingini, er uppflytaraliðið av Skála. Í morgin skulu teir til Klaksvíkar. Í bólkaspælinum í steypakappingini vann Skála báðar dystirnar ímóti KÍ. Tað hevði við sær, at KÍ ikki rakk fjórðingsfinaluni. Dysturin á Skála endaði 4–2, og í Klaksvík vunnu skálamenn 2–1.

Í landskappingini hevur Skála ikki vunnið, og hóast teir hava hagtølini við sær, tá tað ræður um KÍ, so eru fyritreytirnar einki serligar hesa ferð. Kári Nielsen og Pauli Hansen hava báðir verið mitt á miðvøllinum, men hvørgin teirra er tøkur hesa ferð. Kári Nielsen er leikbannaður, og Pauli Hansen gongur á høkjum. Hann varð skaddur í knænum, tá Skála tapti í Runavík síðsta sunnudag.

Harumframt er álopsspælarin Jonhard Frederikberg framvegis skaddur í arminum, og hann hevur eisini pínu undir síðuni.

Hjá KÍ stendur betri til, enn tað hevur gjørt higartil í landskappingini. Tað er stórur saknur í Heðini á Lakjuni, sum gongur við brotnum føti og neyvan verður tøkur aftur undan summarsteðginum. Men nú eru allir hinir, sum hava verið burturfrá orsaka av skaðum, komnir við aftur. Allan Joensen hevur havt trupulleikar av vøddaskaða. Tvær tær seinastu ferðirnar hevur hann sitið á beinkinum uttan at koma á vøllin, men í hesi vikuni hevur hann vant við fullari ferð, og eingin ivi er um, at hann verður ímillum teir fyrstu ellivu ímóti Skála.

Kurt Mørkøre undirstrikaði undan norðoyastevnuni, at nú vóru tveir dystir á skránni, sum skuldu vinnast. Tað eydnaðist ímóti EB/Streymi, sjálvt um tað gingu fimm korter, áðrenn KÍ legði seg framum. Nú fæst at síggja, hvussu tað fer at hilnast ímóti Skála og hvussu venjarin fer at blanda kortini.

– Hjá okkum hevði tað verið sera kærkomið, um tað hevði eydnast at fingið mál tíðliga í dystinum. Teir fara heilt víst at dúva upp á kontra spælið. Vit mugu hava tol, men tað er klárt, at klokkan verður í parti við teimum, heldur Hjalgrím Elttør, sum hesar seinastu ferðirnar hevur verið á miðvøllinum hjá KÍ, og hann hevur verið millum teir mest eyðsýndu á liðnum.

GÍ-VB:

# Mugu fylgja við

**Bæði GÍ og VB eru í bólkinum, sum roynir at elta oddin, og tí eru trý stig av avgerandi týdningi sunnudagin**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Boðini eru tey somu úr báðum legunum, tá vit royna at frætta, hvussu liðini hugsa um dystin sunnudagin. Bæði GÍ og VB hava stóran tørv á trimum stigum í royndunum at fylgja oddinum, og tí kann roknast við, at tað verða tvey lið, sum vilja leypa á, sum hittast í Sarpisgerði.

**Fleri ivamál**

Hjá báðum liðum er tó talan um fleiri ivamál, nú venjararnir leggja seinastu hond á fyrireikingarnar til dystin.

Gøtumenn mugu fyri vist verða Krzystof Popczynski fyriuttan. Hann hevur í alt ár drigist við skaða, og tó at hann hevur roynt at verið við í fleiri dystum, so tykist einki røkjast fyri, at hann kann vera við, tá verandi liðfelagarnir skulu royna seg móti fyrrverandi liðfeløgum hansara.

Fleiri aðrir leikarar hjá GÍ hava drigist við smærri skaðar, men hóskvøldið tóktust flestu av hesum tó at vera tøkir. Ívasamt verður tó, at Magni Jarnskor verður førur fyri at taka lut, og tað kann verða trupult at fáa ta ferðina á spælið, sum annars hevur restað í hjá GÍ higartil í ár.



*Bæði VB og GÍ hava trý stig fyri neyðini, tá tey fara á vøllin sunnudagin, og tí verður viljin at vinna helst størri enn óttin fyri at tapa*

Eisini hjá VB tykjast onkur ivamál vera til dystin. Gisli Sveinbjørnsson meiddi sær fótin í dystinum móti HB, og boðini úr Vági ljóða, at hann nú skal binda fríð í einar tvær vikur. Palli Augustinussen sat á beinkinum seinast, og hann er helst upplagdur trumfur at seta inn á vongverjan.

Eisini tykjast vera eitt sindur av iva uim Tórð Holm, sum fyri tað mesta hevur verið eitt slag av jokara á miðvøllinum hetta árið. Hann kom inn í dystinum móti HB, men fekk okkurt sparkið ta ferðina, og hevur havt nakað av pínu síðani.

Annars tykjast hinir leikararnir at vera klárir, og spurningurin er so, hvørt venjarin aftur velur at broyta upp á liðið. Seinast setti hann Robert Ciezlewicz, Palla Augustinussen og Mørtan úr Hørg á beinkin, uttan at hetta tó bøtti um úrslitið, so tað er ikki óhugsandi, at rúm aftur verður fyri teimum sunnudagin.

# Soleiðis plagar at ganga

| | '01 | '00 | '99 | '98 | '97 | '96 | '95 | '94 | '93 | '92 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| TB-EB/S | - | - | - | - | - | - | - | 4-1 | - | - | 1-0-0 | 4-1 |
| B68-HB | 2-1 | 1-1 | 1-5 | 0-0 | 2-5 | 3-4 | 1-2 | 2-2 | 1-1 | 1-0 | 2-4-4 | 14-21 |
| KÍ-Skála | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 0-0-0 | 0-0 |
| B36-NSÍ | 1-0 | 5-0 | 3-2 | 2-0 | 3-2 | - | 1-0 | 2-0 | - | 5-1 | 8-0-0 | 22-5 |
| GÍ-VB | 1-1 | 2-3 | 3-1 | 0-2 | 4-1 | 1-0 | 3-0 | - | 1-0 | 1-2 | 5-1-3 | 16-10 |

Tað er sjálvandi ikki siðvenjan, sum vinnur nakran dyst, men oftani tykist tað so, at øll lið hava tað óvanliga torført summastaðni. Eitt nú hevur NSÍ tapt níggju av níggju ferðum, tá teir hava vitjað hjá B36 seinastu tíggju árini. HB stendur seg vanliga væl á Svangaskarði og VB hevur ofta argað GÍ í Gøtu eru eisini søgur, sum kunnu lesast úr hagtalstilfarinum.

Talvan sýnir, hvussu mótstøðuliðini sunnudagin hava staðið seg, tá tey hava dystast sínamillum seinastu tíggju árini.



TB-EB/Streymur:

# Kunnu gerast leys

**Taparin sunnudagin verður hangandi í botnstríðnum, og tí er setningurin hjá báðum liðunum helst, at binda væl fyri í verjupartinum**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Árið higartil hevur víst seg at vera júst so trupult, sum mong roknaðu við at tað fór at verða hjá TB og EB/Streymi. Higartil hava liðini fingið trý stig hvør, og bæði eru tey fullvæl vitandi um, at tey nú hava møguleikan at toga seg burtur úr botninum, um trý stig fáast til høldar.



*Talan verður um ein veruligan botngysara, tá TB tekur ímóti EB/Streymi. Fyri bæði er galdandi, at tey fyri alt í verðini ikki mugu tapa dystin*

Hinvegin vita tey eisini, at eitt tap kann hava mest sum óhugnaligar fylgjur, og tí verður setningurin helst fyrst og fremst, at dysturin fyri alt í verðini ikki má tapast. Tá verða nevnliga trý stig upp til ovaru niðurflytingarstrikuna.

Og sum skilst á lagnum, so verða mest sum allir mans tøkir hjá báðum pørtum, so báðir partar verða førir fyri at gera sítt ítarsta til tess at tryggja stigunum.

Fyrr í ár hava hesi liðini annars verið í sama bólki í steypakappingini, og tá var tað TB, sum dróg longra stráið í innanhýsis dystunum, tó at EB/Streymur var liðið, sum endaði ovari, tá stigatalvan varð gjørd upp.

Bólkur A:

# Heimsmeistarar í trongum skóm

**Fraklendingar skulu nú vinna við minst tveimum málum á Danmark, um teir ætla sær víðari úr innleiðandi bólkaspælinum**

HM-FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Seinnu árini hevur Frakland av flestu serfrøðingum verið mett sum sterkasta fótbóltstjóðin í heiminum. Sum bæði heims- og europameistarar er hetta kanska heldur ikki annað enn náttúrligt, men í hesum døgum verða stór spurnartekin sett við, hvussu sterkt liðið er, ella um alt í veruleikanum bert snýr seg um ein ella møguliga tveir leikarar.

Tað er nevnliga so, at tveir av mest týðandi leikarunum hjá Fraklandi, Zidane og Pires, ikki hava tikið lut í HM-kappingini. Pires varð álvarsliga skaddur stutt fyri kappingina, og enn er ikki víst, hvussu verður við skaðanum hjá Zidane.

Tað kann so undir øllum umstøðum staðfestast, at uttan hesar hevur gingið av skriðjuni hjá Fraklandi. Teir taptu setunardystin fyri Senegal, og hósdagin spældu teir so málleysan javnleik móti Uruguay, og nú er veruliga trýst á meistarunum.

**Danmark ráð til tap**

Støðan undan seinastu dystunum í Bólki A er nevnliga tann, at Frakland og Uruguay hava eitt stig hvør, meðan Danmark og Senegal hava fýra stig í part.

Tað vil siga, at Frakland við sigri á Danmark kemur upp á fýra stig, men hetta er ikki nóg mikið. Danir hava nevnliga sum er skotið tvey mál fleiri enn Frakland, og tí skal Frakland vinna við meira enn einum máli, um teir skulu víðari. Vinna teir bert við einum máli eru teir ájavnir dønum í stigum og málmuni, men Danmark hevur tá skotið eitt mál fleiri, og koma tí víðari. Hetta tó treytað av, at Dysturin millum Uruguay og Senegal ikki endar við onkrum løgnum úrsliti so sum 4-3 ella líknandi til suðuramerikanska landið.

Og sum liðini hava spælt higartil, so er lítið sum bendir á, at Frakland skal vinna við fleiri málum á Danmark. Teir megnaðu ongantíð at bróta verjugarðin hjá Senegal í fyrsta dystinum, og heldur ikki bar hetta til ímóti Uruguay. At vandamikli álopsmaðurin, Henry, og miðvallarmotorurin, Petir, báðir eru leikbannaðir til dystin móti dønum ger neyvan heldur støðuna betri.

Hósdagin spældu Danmark og Senegal annars javnt í einum hampuliga undirhaldandi dysti. Danir høvdu betra spælið fyrra umfarið, og teir komu eisini á odda, tá Jon Dahl Tomasson (nú verður hann róptur Tre-Mål-San) sendi brotsspark í netið.

Seinna umfarið tók Senegal tó yvir, og til tíðir vóru danir snøgt sagt niðurspældir, men teir munnu helst iðra seg um útjavningina, sum var úrslitið av fleiri donskum mistøkum. Fyrst mistu teir bóltin, uttan at hava neyðugu garderingina í verjupartinum, so Senegal slapp í kontra-álop, og her framdi Heintze eisini eitt mistak, so Diao fekk skorað. Sami Diao fekk annars seinni bæði gult og reytt kort, so hann verður ikki við í seinasta dystinum móti Uruguay.

**Úrslit:**
Danmark-Senegal 1-1
1-0: Jon Dahl Tomasson, 16
1-1: Salif Alassane Diao, 52

Frakland-Uruguay 0-0

# Eingin áhugi

Tað er nú staðfest, at amerikumenn hava lítlan áhuga fyri fótbólti. Landið hevur sjáldan staðið seg væl í HM-kappingini, men mikudagin skaptu teir eina sanna sensatión, tá teir vunnu 3-2 á Portugal. Kanningar eftir hetta vísa tó, at áhugin fyri fótbóltin USA er at kalla einki øktur fyri tað. Spurningurin er so, um nakað hjálpir yvirhøvur.

**Troystarorð**

Í Portugal er lagið tó sum vera man ringt, eftir at liðið tapti fyri USA. Nøgva staðni var mest sum landasorg eftir tapið, og nú hevur sjálvasti forsetin roynt at betra um lagið. Hann hevur persónligt sent eitt brævi til portugisisku venjingarleguna við troystandi orðum í vóni at hetta kann fáa spæligleðina fram hjá leikarunum til komandi dystin.

**Bót fyri sjónleik**

FIFA boðaði undan kappingini frá, at sjónleikur nú skal revsast harðari, enn talan hevur verið um áður, og teir hava eisini hildið orð. Hetta hevur brasilska stjørnan, Rivaldo, nú fingið at sanna. Í dystinum móti Turkalandi dugdi hann væl at fáa sum mest burturúr, tá Unsal fekk reytt kort fyri at skjóta bóltin eftir honum, og hetta hevur FIFA revsað við eini bót upp á 58.000 kr.

Um talan er um harða revsing, kunnu lesararnir so sjálvir meta um. Í Barcelona er lønin hjá Rivaldo umleið 110.000 krónur um dagin – eftir skatt!

**Sendur heim**

Stóra stjørnan hjá Slovenia, Zlatko Zahovic, var alt annað enn fegin, tá hann varð skiftur út í dystinum móti Spania. Fyrst sýndi hann ein somikið óhøviskan atburð mótvegis venjaranum, Katanec, at hesin hevur sagt seg ikki vilja standa við ábyrgdini, tá HM er liðugt, og síðani er hann sendur heim av slovenska fótbóltssambandinum.

Sjálvur sigur Zahovic, at hetta kanska var tað besta fyri liðið.

## Dystir um vikuskiftið

**Fótbóltur**

**1. deild menn**

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 09.06 | TB-EB/Streymur | Lassin Isaksen |
| 09.06 | B68-HB | Petur Skarðenni |
| 09.06 | KÍ-Skála | Jens Petur Brattalíð |
| 09.06 | B36-NSÍ | Niklas á Líðarenda |
| 09.06 | GÍ-VB | Oddmar Andreasen |

**2. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 08.06 | B36-B71 | Eiler Rasmussen |
| 08.06 | Sumba-ÍF | Jón Kári Frederiksen |
| 08.06 | ÍF-NSÍ | Tummas P. Olsen |
| 08.06 | KÍ-FS Vágar | Regin Egholm |
| 08.06 | VB-HB | Dia Lamhauge |

**3. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 09.06 | AB-Royn | Georg Rasmussen |
| 09.06 | TB-ÍF | Poul Erik Jacobsen |
| 09.06 | B68-GÍ | Jákup Martin Kjeld |
| 09.06 | B71-B36 | Ransin N. Djurhuus |
| 09.06 | HB-FSV | Hans Eivind Olsen |

**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 09.06 | B68-B36 | Jonhard Hansen |
| 09.06 | HB-GI | Hans Eivind Olsen |

**HM-kappingin**

| Dagur | Klokkan | Dystur |
|---|---|---|
| 08.06 | 7.30 | Suður Afrika-Slovenia |
| 08.06 | 10.00 | Italia-Kroatia |
| 08.06 | 12.30 | Brasilia-Kina |
| 09.06 | 7.30 | Mexico-Ecuador |
| 09.06 | 10.00 | Costa Rica-Turkaland |
| 09.06 | 12.30 | Japan-Russland |
| 10.06 | 7.30 | Suður Korea-USA |
| 10.06 | 10.00 | Tunis-Belgia |
| 10.06 | 12.30 | Portugal-Póland |